Sumba-B71 1-0 (1-0):

# Sumba hevur framvegis fult

**Sumba vann týdningarmikla heimadystin móti B71, og syrgdu sostatt fyri, at teir eru einasta liðið við fullum stigatali í deildini**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Sum niðurflytarar skuldu sandoyingar ivaleyst roknast sum favorittar, tá teir leygardagin vitjaðu á Krossinum í Sumba. Gaman í er ikki so langt síðani, at Sumba var í bestu deildini, men árið í fjør bendi tó tann vegin, at Sumba ikki er búgvið til uppflytingarstríðið í aðru deild.

Tað mundu sandoyingar hinvegin halda seg vera, men teir máttu to ásanna, at tað framvegis er alt annað enn lætt at vinna sær stig á Krossinum.

### Skoraði móti gamla liðnum

Sumbingarnir stríddust nevnliga frá fyrsta bríksli. Teir vóru grammari á flestu bóltunum, og tó at sandoyingar royndu at svara aftur, so eydnaðist teimum ikki at skapa teir heilt stóru málmøguleikarnar.

Hinvegin vóru tað sumbingar, sum løgdu seg á odda, tá Bjørjn Thorsteinsson um miðjan fyrra hálvleik sendi bóltin í netið. Bjørn spældi annars við júst B71 í farna kappingarári, men hann hevur so í ár valt at skifta til Sumba, og í øllum førum munnu sumbingar fegnast um hetta.

Seinastu trý korterini royndu sandoyingar at trýsta, til tess at fáa í øllum førum annað stigið við sær, men heimaliðið helt alla tíðina ímóti, og syrgdu teir við hesum fyri, at teir undan dystunum annan hvítusunnudag vóru einasta liðið í deildini við fullum stigatali.

Sum nevnt aðrastaðni í blaðnum, so helt hendan støðan sær eisini eftir halguna, og eru sumbingar soleiðis oddalið, tá teir komandi vikuskifti fáa vitjan av ÍF, sum snøgt sagt skal vinna, um fjarstøðan til oddin ikki skal gerast alt ov stór, næstan áðrenn kappingin er byrja.

Tá fáa sandoyingar vitjan av FS Vágum, og tann dysturin fer helst at geva eina ábending um, hvussu teir báðir niðurflytararnir fara at skikka sær í oddastríðnum í næstbestu deildini í summar.

**Dysturin í tølum**
Sumba-B71 1-0 (1-0)
1-0: Bjørn Thorsteinsson

Lesið
Sosialurin
-tað loysir seg

FSV-VB 8-0 (3-0):

# Stórsigur í Vágunum



*Vagbingar runnu fyri tað mesta aftan á teimum á heimaliðnum, tá FS Vágar í útsetta dystinum vunnu stórsigur á uppflytarunum*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Eftir vónbrotið leygardagin reistust vágamenn annan hvítusunnudag, tá VB var á vitjan**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Ofta verður tikið til, at munurin millum deildirnar í føroyskum fótbólti er stórur, og hetta varð so dyggiliga undirstrikað, tá VB annan hvítusunnudag vitjaði í Vágunum.

Ikki tí. Bæði liðini halda til í næst bestu deildini, men meðan VB er uppflytari og fyrst og fremst stríðist fyri at halda sætið í deildini, eru vágamenn júst fluttir niður og hava ætlanir um eina skjóta afturvendan til bestu deildina.

### Eingin ivi

Tað var heldur ikki so leingi, so hevði heimaliðið líka sum gjørt greitt, at tapið í Gundadali leygardagin ikki var annað enn ein kiksari.

Bjarni Prior legði fyri við málskjótingini, og tá Clayton so nakað seinni sendi bóltin í kassan, so var dysturin meira ella minni avgjørdur, tí vágamenn høvdu alla tíðina avgerandi orðið at siga í dystinum.

Undan steðginum gjørdu vágbingarnir sjálvmál, og so fór at rapa. Fimm ferðir eftir steðgin eydnaðist vágamonnum at skora, og trivaligi sigurin kann ikki annað enn styrkja teir í trúnni um, at liðið er nóg sterkt til at vera við í oddinum.

### Stórar uppgávur

Sum nevnt, so er málsetningurin hjá liðunum heldur ymiskur, men fyri báðar partar verður talan um sera týdningarmiklar dystir komandi vikuskifti.

Tá skal FS Vágar til Sands, har hin niðurflytarin úr 1. deild, B71, tekur ímóti. Eftir stigamissirnar um vikuskiftið er hetta ein dystur, har hvørgin parturin hevur ráð at tapa, og ivaleyst fer hetta at geva eina greiða ábending um, hvussu støðan í oddinum fer at laga seg.

Vágbingar fara tá til Leirvíkar, har heimaliðið eisini telist millum teirra, sum berjast fyri tilveruni í deildini.

Sjálvandi fellur ikki nøkur avgerð í hesum dystinum, men fyri restina av kappingini og í øllum førum fyri aktuellu støðuna á stigatalvuni verður helst talan um ein dyst, sum hevur stóran týdning í botnstríðnum.

**Dysturin í tølum:**
FS Vágar-VB 8-0(3-0)
1-0: Bjarni Prior
2-0: Clayton Soares
3-0: Sjálvmál
4-0: Elfinn Ørvarodd
5-0: Bjarni Prior
6-0: Birgir Joensen
7-0: Clayton Soares
8-0: Jákup Joensen

KÍ-LÍF 4-0 (1-0):

# KÍ stimar uppeftir

**Annað vikuskiftið á rað vann KÍ tryggan sigur, og liðið hevur longu nú lagt hampuliga fjarstøðu til niðaru sessirnar**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Hóast tað í skjótt nógv ár hevur verið fastur táttur hjá KÍ, at teir eisini eiga lið í 2. deild, so hevur tað oftani staðið nógv á í so máta. Vanliga hevur liðið talst millum teirra, sum berjast fyri at sleppa undan niðurflytingini, og onkun tíð hevur talan verið um upp- og niðurflytingardystir, áðrenn framhaldandi tilveran í deildini er tryggjað.

### Lítil mótstøða

Í so máta man tað vera hugaligur lesnaður, nú klaksvíkingar líta at stigatalvuni fyri aðru deild. Eftir at teir í fyrsta umfarinum vórðu smurdir av í Fuglafirði, hevur liðið nú vunnið tveir dystir á rað, og hóast kappingin er long, so er tað hugaligt at fjarstøðan niður til botnin longu tykist at vaksa.

Leirvíkingar høvdu sum heild lítið at bjóða uppá, tá teir komu um fjørðin leygardagin. Klaksvíkingar vóru grammari eftir øllum bóltum. Teir royndu at trýsta, og við Olgar Danielsen í álopinum er vandin fyri einum máli altíð til staðar.

Tað var tó Gunnleivur Biskopstøð, sum fekk einasta málið í fyrra hálvleiki, og eftir steðgin kom so veruliga ferð á. Leon Bjartalíð økti, áðrenn altíð vandamikli Olgar fekk sær eitt mál, og móti dystarenda kundi Johan N. Hansen steingja og sløkkja, tá hann var seinasti maðurin á enn einum KÍ álopi.

KÍ er sum nevnt longu nú í ferð við at sleppa sær undan niðurflytingarvandanum, men tað stendur ikki eins væl til hjá leirvíkingunum. Higartil hava teir bert tey trý stigini, sum teir vunnu frá grannunum úr ÍF, og skal talan ikki gerast um alt ov hart niðurflytingarstríð, so skulu helst nøkur stig koma á kontina nakað skjótt. Fyrsti møguleikin fyri hesum verður komandi vikuskifti. Tá koma uppflytararnir úr VB á vitjan, og tann dysturin fer kanska at geva eina ábending um, hvussu botnstríðið fer at laga seg hetta kappingarárið.

**Dysturin í tølum**
KÍ-LÍF 4-0(1-0)
1-0: Gunleiv Biskupstøð
2-0: Leon Bjartalíð
3-0: Olgar Danielsen
4-0: Johan Nystrøm Hansen



# OL-liðið 2002

**Talvolympiadan verður í ár í Slovenia, og hjá føroyingum eru vónirnar betri enn nakrantíð.**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Fyrst í august verður føroyska olympiaduliðið úttikið, og enn er kampur um plássini. Kappingin verður leikt um mánaðarskifti oktober/november. Seks telvarar fara at umboða Føroyar, og fýra av hesum hava nærum longu við vissu tryggjað sær pláss, og teir eru:

### John Arni Nilssen, 27 ár, 2384 ratingstig

Skopuningurin, sum er búsitandi á flatlondum, hevur telvað væl seinasta árið. Síðani eina skuffandi FM-kapping í Vestmanna í fjør - har ratingtalið endaði niðri á 2315 - hevur hann veruliga ment seg við góðum úrslitum á flatlondum. John Arni er rímiliga aktivur nú á døgum, hevur valt sínar kappingar gjølla og er tískil væl fyrireikaður. Í dag er hann uttan iva føroya sterkasti telvari. Nærum 100 ratingstig eru niður til næsta mannin á føroyska ratinglistanum. John Arni hevur enn føroyameistaratittulin til góðar

John Arni umboðaði Føroyar á fyrsta borði í OL 2000, og tá var hann nær við sín fyrsta IM-norm eftir einastandandi úrslit. Vónandi vísur hann minst sama støði í Slovenia.

### Heini Olsen, 32 ár, 2299 ratingstig

Fimmfaldaði føroyameistarin úr Klaksvík, sum somuleiðis er búsitandi á flatlondum, hevur verið sera aktivur eftir FM í fjør. Tá endaði talvliga niðurgongd hansara, tí síðani hevur gingist væl hjá Heina. Spakuliga nærkast hann aftur 2300-markinum, og tað gevur góðar ábendingar til OL, sum hann mangan hevur luttikið í.

Í seinastu olympiadu mannaði Heini triðja borð við ivasomum úrsliti. Í ár tekur hann møguliga plássið á øðrum borði frá IM John Rødgaard, og tað fer ivaleyst at geva honum eyka stimbur at stríðast fyri góðum úrsliti. Heini hevur mangan verið álitið hjá føroyingum í farnum olympiadum.

### IM John Rødgaard, 47 ár, 2272 ratingstig

Nevnir tú Talvolympiadu, mást tú eisini nevna IM John Rødgaard. Síðani 1984 hevur tvøramaðurin verið fastur fúsur á føroyska liðnum, og hvørja ferð hevur hann verið álitið sjálvt við frálíkum úrslitum. John hevur rutinu sum fáur, og er ein sannur fongur á olympiaduliðnum.

Síðani OL-2000, har hann hevði gott úrslit, hevur tó ikki hilnast væl hjá John á heimliga talvøkinum, undantikið FM-2001, sum hann ognaði sær. Tvær ivasamar liðkappingar og eitt fjórða pláss í árligu FM-kappingini er úrtøka hansara seinastu árini, sum somuleiðis sæst á ratinglistanum. Men sum sagt, John hevur frálík OL-úrslit at vísa á, og í OL-høpi er rutinu eisini alneyðug.

### Hans Kristian Simonsen, 18 ár, 2196 ratingstig

Føroyameistarin úr Kollafjørði fær eftir ætlan pláss á OL-liðnum, vegna hansara FM-heitið og sum besti unglingur. Hans Kristian er okkara nýggja stjørnuskot, ikki minst eftir simultansigurin á Garry Kasparov fyri góðum ári síðani, men eisini fyri síni frálíku úrslit síðani nevnda sigurin, undantikið Atlantic Weekend kappingina í Keypmannahavn herfyri, har hann telvaði væl undir miðal.

Spennandi verður at fylgja Hans Kristiani í olympiaduni, har hann helst verður eykaleikari, sum sætti maðurin á liðnum.

### Kampur um tvey pláss

Eingin hevur enn játtað sína OL-luttøku. Vit eiga tí ikki at taka luttøkuna hjá nevndu telvarum fyri givið.

Talvsambandið hevur boðað frá, at umframt fýra fastir telvarar, verða somuleiðis tveir eyka-leikarar úttiknir. John Arni, Heini og John verða fyrstvaldir, meðan Hans Kristian er eykamaður. Síðani verða tveir mans valdir aftrat, og í skrivandi løtu eru tríggir um boðið til hesi tvey pláss, tá rating viðvíkur.

Talan er um Flóvin Tór Næs, 2251 ratingstig, Eyðun Nolsøe, 2232 ratingstig, og Ólavur Simonsen, 2208 ratingstig. Allir hava fyrr umboðað Føroyar í OL, og eru hesir tríggir eisini sera javnir telvarar.

Eftir Atlantic Weekend-kappingina herfyri, vísur tað seg at Ólavur í løtuni hevur togað seg framum Eyðun í rating. Nógv kann enn broytast á listanum, tí í juli-mánaða fara fleiri av nevdu telvarum at royna seg í kappingum, og hjá summum er tað eisini neyðugt um OL-pláss skal náast. Spennandi verður tí at fylgja gongdini.

Tá OL-liðið loksins skal úttakast, vigar føroyska ratingtalið mest, men eisini altjóða ratingtalið og onnur ávíkavís krøv verður hugt nærri at.




*Hans Kristian Simonsen sleppur fyri fyrstu ferð við til talv-OL, men í fyrsta umfari verður hetta helst sum eykaleikari*

HB-FSV 4-3 (1-0)

# Favorittarnir koppaðu



*Vágamenn og Jens Erik Rasmussen fingu sær ein ordans skelk, tá teir vóru í Gundadali. Eitt skifti var HB á odda 4-0, men tað var tó um reppið, at vágamenn kortini fingu stig við sær heimaftur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Púra óvæntað vann HB dystin móti FS Vágum, tó at tað var um reppið, at vágamenn við 10 monnum vunnu seg upp á javnt**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Vágamenn vóru longu undan kappingini mettir sum stórfavorittar at vinna aðru deild, og tað var eisini soleiðis, at teir fóru inn á vøllin leygardagin, tá útidysturin móti HB var á skránni.

### Tíggju móti ellivu

Tað var tó so hampuliga skjótt greitt, at her skuldi talan ikki gerast um nakran avgreiðsluspurning hjá vágamonnum. HB var alla tíðina væl við í spælinum, og tá vágamenn í fyrra hálvleiki fingu leikara riknan av vøllinum, tí hann hevði bjargað við hondini, lá væl fyri hjá HB. Rani Debes Christiansen, sum nú aftur spælir eftir at hava verið skaddur í nærum hálvt annað ár, setti eftirfylgjandi brotssparkið í netið, og hetta varð so eisini hálvleiksstøðan.

Í seinna hálvleiki gjørdi HB skjótt av. Fyrst skoraði Pætur við langskotið. Síðani økti Rani Debes Christiansen aftur, og tá Rókur av Fløtum Jespersen síðani økti til 4-0, eftir at hann var fyrstur á returbólti, var líkt til, at HB skuldi vinna ein óvæntaðan stórsigur.

Hesin varð tó av ongum. Fyrst og fremst tí venjingarstøðan hjá gestunum var nakað væl betri enn hon hjá heimaliðnum.

Tjúgu minuttir fyri leiklok minkaði John Johannesen um munin, og tá Clayton tíggju minuttir seinni minkaði um munin, sóu teir tíggju vágamenninir brádliga møguleikan at fáa stig við sær aftur, og tað var eisini um reppið, at hetta eydnaðist. Stutt fyri leiklok var Clayton aftur á blettinum, og seinastu løtuna tveittu gestirnir alt fram í royndunum at javna, og tað mundi eisini eydnast. Men nærri enn eini roynd, sum varð bjagað á málstrikuni, komu teir tó ikki.

Yvir høvur var talan sostatt um eitt flott úrslit hjá HB, og tað skal einki takast frá teimum í so máta. Men tað skerst tó ikki burtur, at skal ætlaða uppflytingin hjá FS Vágum gerast veruleiki, so eru neyvan ráð til alt ov nógv mistøk av hesum slagnum.

**HB-FS Vágar 4-3(1-0)**
1-0: Rani Debes Christiansen
2-0: Pætur Dahl
3-0: Rani Debes Christiansen
4-0: Rókur av Fløtum Jespersen
4-1: John Johansen
4-2: Clayton Soares
4-3: Clayton Soares